

*Tað hevur verið langt millum tær góðu sólløturnar í ár. Men tá sólin so dagar undan er ein góður svimjitúrur í lokala svimjihylinum ikki at forsmáa*

*savnsmynd*

# Fleiri sóltímar og meiri avfall

**Danir hava verið vælsignaðir við sera nógvari sól seinasta mánaðin. Talan er um flestu sóltímarnar í samfull 60 ár.**
**Eisini í Føroyum vóru fleiri sóltímar í ár enn í fjør – um teir ikki vóru eins nógvir sum í øðrum londum**

VEÐURLÍKINDI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Summarveður: Hóast mong munnu hava suffað yvir mjørkan, sum lá yvir firðir og sund í farna mánaði, so slapp sólin kortini framat við ávísum millumbilum.

Í veruleikanum vóru fimm fleiri sóltímar í juli mánaði í ár enn í sama mánaði í fjør – 131 móti 126.

Hagtøl frá Meteorologisk Institutt í Danmark vísa, at besti sóldagurin í ár var mánadagurin 17. juli, tá sólin skein í omanfyri 13 tímar.

Ta vikuna var sólin rættiliga nógv frammi, og lítlar mongdir av avfalli.

Men undan góða sóldegnum 17. juli regnaði tað so tað stóð eftir. Henda dagin komu ikki færri enn 27 mm. av avfalli niður.

**Nógv avfall**

Tað eru fleiri fólk sum hava hug at kæra seg um hitalagið í Føroyum. Serliga tá hugt verður eftir ógvusliga hitanum har suðuri í Europa.

Miðalhitin í juli mánaði í ár var 11,4 stig og er hetta eitt hálvt stig meiri enn sama mánað í fjør, veit danska veðurstovan at siga frá.

Mesti hitin, sum varð máldur í ár var 16,1, meðan mesti hitin í fjør var heili 16,9 stig.

Sum longu nevnt kann juli mánaður eisini verða herviligur til avfall. Í ár var einki undantak í so máta.

Farna mánaðin komu ikki færri enn 103 mm. av avfalli niður, og var hetta ein stór øking í mun til árið fyri, tá einans 44 mm. av avfalli vóru.

Í ár vóru 16 regndagar í juli mánaði móti einans sjey í fjør.

Tí er ikki uttan orsøk, tá fólk siga at hetta summarið royndist ikki av teim bestu. Í gjár var kortini ein góður dagur, og tí hava fólk kanska longu gloymt ringa veðrið í summar.

# Grava út fyri nýggja skúlanum

**Seinnapartin í dag verður spakin settur í jørðina fyri nýggjum skúli, sum Tórshavnar kommuna skal byggja við Løgmannabreyt í Hoyvíkshaganum.**

SKÚLI
*Snorri Brend*

**Hoyvík:** Henda ætlanin um nýggja skúlan hevur ligið á tekniborðinum í eina tíð. Nú er komið so mikið væl áleiðis, at farast kann undir at fyrireika byggingina.

– Fyrsta stigið er at grava oman av stykkinum har skúlin skal verða, sigur formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini, Jógvan Arge.

Økið, har skúlin verður bygdur á er einar 20.000 fermetrar til støddar og liggur beint eystanfyri Løgmannabreyt.

Hetta er júst tað økið, her mong nýggj sethús eru bygd seinastu árini.

**Tvey ár**

Samstundis við stóru byggingina í Hoyvíkshaganum er tørvurin á einum nýggjum skúla eisini vaksin samsvarandi.

– Ætlanin er tí at fáa hann lidnan um tvey ár – til skúlaársbyrjan 2008, sigur Jógvan Arge.

Skúlin verður bygdur til nýggju árgangir. Har verður kortini eisini pláss fyri frítíðarskúla.

Kostnaðurin er mettur at liggja omanfyri 100 mió. kr.

Hetta er fyrsta stóra skúlabyggingin í høvuðsstaðnum síðani Eysturskúlin varð bygdur seinast í sjeytiárunum.



*- Skúlin skal verða liðugur um tvey ár, sigur Jógvan Arge, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini*

## STUTT SAGT

## Løgmaður setir stevnu um missión

**Nesvík:** Fyrst í komandi mánaði verður skipað fyri stórari ráðstevnu um útimissión í leguhúsinum í Nesvík.

Stevnan byrjar fríggjakvøldið 8. september og varir alt vikuskiftið. Tað hevur her eydnast fyrireikarunum at fáa løgmann Jóannes Eidesgaard at seta stevnuna. Orsøkin til hetta er at løgmaður hevur uttanríkismál sum eitt av sínum málsøkjum. Undir uttanríkismálum er eisini menningarhjálp.

Landsstýrið hevur hækkað menningarstuðulin og er ætlanin at brúka henda til mennandi verkætlanir og vanlukkuhjálp.

Ætlanin við stevnuni er at kveikja áhuga og kalla til missión á øllum økjum í kirkjuligum samanhangi, siga fyrireikararnir. Á stevnuni verður kunnað um teir ymsu møguleikarnar og avleiðingarnar av at fara út sum trúboðarar.

Annars verður norðmaðurin Tormod Engelsviken høvuðstalari á stevnuni.

**sb.**

## Dagstovnurin letur upp í heyst

**Strendur:** Í heyst letur nýggi dagstovnurin á Strondum upp.

Fyrri í summar var stovnurin reistur og leiðari settur á stovninum. Talan er um Sonlis Høj Joensen, sum í løtuni starvast sum dagrøktarleiðari í Sjóvar kommunu. Hon tekur við starvinum í dag.

Í dag er samstundis freistin úti at lata inn uppskot um, hvussu nýggi stovnurin skal eita. Sum skilst hevur áhugi verið fyri hesi kappingini.

Navnið verður avdúkað tá stovnurin letur upp 1. november.

**sb.**



*Strandingar fáa nýggjan dagstovn í heyst*

## Nýggj brúgv um Fossá

**Haldórsvík:** Fyrst í komandi ári er ætlanin at fara undir gerð av nýggjari brúgv um Fossá, ið liggur millum Langasand og Haldórsvík.

Prosjekteringin av ætlanini er í løtuni í gongd, og er ætlanin at hetta arbeiðið skal verða liðugt í desember mánaði í ár. Tað er Landsverk sum er byggiharri, meðan HMP Consult virka sum tekniskir ráðgevarar.

Ætlanin er síðani at arbeiðið skal bjóðast út fyrst í komandi ári.

**sb.**